## Ung niðan á Vatnajøkul

Tveimum ungum føroyingum stendur í boði at vera við í verkætlanini Vatnajøkul í juli í ár. Verkætlanin eitur »Námsferð fyri norðurlendskan ungdóm til Íslands, náttúra, lívsvirði og burðardygg menning« Ferðin er fyri fólk í aldrinum 18 til 30 ár, mann og kvinnu úr hvørjum landi, fólk, sum hava áhuga fyri umhvørvi og veðurlagsbroytingum. Ferðin er fyrst í juli, frá 2. til 9. juli. Áhugað í Føroyum kunnu senda teldupost til frnorden@kallnet.fo sum skjótast. Meira um ferðina er á heimasíðuni hjá Norrøna Felagnum í Føroyum, www.norden.fo



## USA skal byggja kjarnorkuverk

Republikanararnir í amerikonsku Kongressini halda, at USA eigur at byggja 100 kjarnorkuverk tey næstu 20 árini. Leiðararnir í republikanska flokkinum løgdu í gjárkvøldið fram eina ætlan um komandi orkupolitikk, og har er kjarnorka ein týðandi partur. Umframt kjarnorkuna ætla republikanararnir at økja olju- og gassframleiðsluna úti fyri amerikonsku strondini, fara undir at leita eftir olju og gassi í einum friðaðum øki í Alaska og at byggja fleiri oljureinsiverk. Uppskotið hjá republikanarunum er mótspæl ímóti orkupolitikkinum hjá demokratunum, sum í størri mun er grundaður á verandi orkukeldur.

ryggi









*Talan var um einstaklingaítrótt, men sjálvandi skuldi ein staffet rennast*



*Eitt langt lop frameftir, og sigurin gerst klárur*

# Fríð á frælsum ítróttardegi

Í morgun hevði Venjingarskúlin ítróttardag. Vanliga er hann á skúlanum, men í ár varð hann hildin á Tórsbreyt.

Frælsa ítróttin slapp til sín rætt hjá Venjingarskúlanum, tá tey í morgun skipaðu fyri ítróttardegi. Hóast lið vóru í ymsum greinum, næmingarnir royndu seg í, so var tað serliga einstaklingaítróttin og frælsa ítróttin, ið varð íðkað á ítróttardegnum.

Eftir ein strævnan morgun hjá næmingunum vóru franskir hot dogs og okkurt leskandi á skránni.